Oyrarbakki 27. mai 2021

Góðu foreldur og næmingar.

Í viku 22, sum byrjar mánadagin 31. mai, fer miðdeildin at at hava evnisviku.

Evnið er "NÁTTÚRAN OG ÚTILÍV"

Dagurin byrjar sum vanligt kl. 8 og endar hvønn dag kl. 12.35

Skráin fyri dagin:

Kl. 8 møta allir næmingar og lærarar til morgunsang

Kl. 8.10 byrjar virksemi

Kl. 12.00 samlast allir næmingar og starvsfólk aftur í trappuni til at taka saman um dagin, kunnað um næsta dag og at syngja nakrar sangir

Kl. 12.35 endar skúladagurin

Vikan er skipað soleiðis, at allir næmingarnir í miðdeildini eru blandaðir í fimm bólkar við áleið 16-17 næmingum í hvørjum bólki.

Hvør bólkur er til eitt og sama virksemi í ein heilan dag. Virksemini eru: ein hagatúrur - ein dagur í náttúrulundini - gera sandlist á sandinum í Leynum - gera plantukassar og gróðurseta blómur – arbeiða við steinum.

Tað, sum eisini er serligt hesar dagarnar er, at næstan so gott, sum allur skúladagurin er uttandura og ikki tætt við skúlan. Hetta setur krøv til hvussu næmingarnir eru klæddir. Tað hevur sera, sera stóran týdning fyri hvussu skúladagurin hjá tykkara barni eydnast. Her hugsa vit serliga at tey eru heitt ílatin, hava skiftiklæðir og eisini regnklæðir hjá sær.

Tann dagin tey fara í hagan, er neyðugt, at næmingurin sjálvur kann bera tað, sum er at bera.

Eisini er tað neyðugt at hava ein drekkidunk við vatni hjá sær, hvønn dag.

Ein góður matpakki er eisini ein fortreyt fyri at fáa ein góðan skúladag.

Tann dagin tit arbeiða við steinum skulu tit mála – so tit mugu vera í klæðum, sum tola máling.

Um okkurt er, sum ikki er greitt, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við flokslærarin.

Vinarliga – allir lærararnir í miðdeildini í Skúlanum við Streymin

Vikuætlan hjá hvørjum einstøkum næmingi

Navn:_____

Set ein kross har tú skalt vera, so er lættari hjá tær at vita hvar tú ert hvønn dag.

		Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag
Kl. 8.00 til 8.10		Morgunsamling í trappuni – morgunsang og kunning				
Kl. 8.10 til 12.00	Hagatúr	tjøldur	springarar	summardáar	sóljur	lundar
	Sandlist	lundar	tjøldur	springarar	summardáar	sóljur
	Náttúrulundin	sóljur	lundar	tjøldur	springarar	summardáar
	Blómukassar	summardáar	sóljur	lundar	tjøldur	springarar
	Steinar	springarar	summardáar	sóljur	lundar	tjøldur
Kl. 12.00 til 12.15		Allir næmingar enda dagin í trappuni – kunning um næsta dag + ein sang				